Formaður Javnaðarfloksins um nýggjársrøðu løgmans:

# Sameiningarlyndið skal vísast í verki

**Formaður Javnaðarfloksins, Jóannes Eidesgaard, er væl nøgdur við at løgmaður nýtti nýggjársrøðuna sum høvi til at tala fyri sameinan heldur enn spjaðing millum føroyingar, og gevur løgmanni ein mánað til sjálvan at ganga undan og vísa at hann veruliga meinar tað, hann sigur**

NÝGGJÁRSRØÐA
*Rúnar Reistrup*

Orðini hjá løgmanni í nýggjársrøðu síni, um at vit øll skulu liva í hesum landinum, eisini eftir komandi fólkaatkvøðuna um fullveldisætlanina hjá samgonguni fáa góða móttøku hjá Jóannesi Eidesgaard.

– Eg má siga, at mær dámdi sera væl endan á røðuni, har løgmaður tosar um hvussu umráðandi tað er ikki at seta kílar millum fólkið. Fyri mær er júst hetta, at fólk verða býtt sundur í tveir ella fleiri partar, eitt tað størsta vandamálið í føroyskum politikki í løtuni.

Men meðan formaður Javnaðarfloksins er nøgdur við orð løgmanns, so bíðar hann enn eftir gerðunum frá landsins politiska leiðara.

– Eitt er at hann heitir á fólki um at forða fyri spjaðing og klandri, men eg haldi at vit onnur nú mugu krevja av løgmanni, at hann sjálvur gongur undan og vísir í verki, at hetta ikki bert eru vøkur orð.

Tað kundi løgmaður sambært Jóannesi Eidesgaard passaliga gjørt við at arbeiða fyri einari breiðari politiskari semju um framtíðarstøðu Føroya.

– Enn hava vit ikki sæð nøkur greið tekin um at samgongan vil sameina føroyingar, men eftir løgmansrøðuni at døma er samgongan við at hálsa um, so lat okkum nú geva løgmanni ein mánað ella so og síggja hvat tað verður til, heldur Jóannes Eidesgaard.

## Fer ov illa við dønum

Formaður Javnaðarfloksins var staddur í Danmark á nýggjárinum, og upplivdi har at Danmarks Radio endurgav løgmann fyri at siga at danska samráðingarnevndin ferð eftir ferð hevði brotið avtalur undir samráðingunum um framtíðarstøðu Føroya.

Hesi heldur hvøssu orðini og pástandurin í røðuni um at danir noktaðu at fylgja vanligum samráðingarreglum skurra eitt sindur oyrunum á Jóannesi Eidesgaard.

– Nú veit eg ikki hvørjar samráðingarreglur løgmaður sipar til og tað ber illa til hjá mær at gera viðmerkingar beinleiðis til tað, sum fór fram á fundum, har eg ikki var hjástaddur, men fakta er, at tað liggur eitt tilboð frá dønum eftir samráðingarnar. Tí haldi eg tað vera skeivt av løgmanni at fyrigykla fyri fólkinum, at danir royna at forða føroyingum í at loysa. Tað er jú ikki í trá við veruleikan. Støðan er heldur tann, at løgmaður situr eftir við einum samráðingarúrsliti, sum hann ikki torir at standa við og leggja fram fyri føroyingar.

## Krokudillutár frá løgmanni

Løgmaður segði í nýggjársrøðu síni, at skuldu aldargomul rættindi hjá føroysku tjóðini ikki missast, var einki annað at gera, enn at fara frá samráðingarborðinum.

Hetta trýr Jóannes Eidesgaard lítið uppá.

– Tað er bestemt ikki vanligt at vera verri fyri eftir at hava samráðst, og um hatta veruliga var støðan, so hevur onkur klokka alvorliga í tí.

Fyri Jóannes Eidesgaard líkjast orðini mest einari burturforkláring av samráðingarslitinum, sum mest av øllum líkist krokodillutárum.

– Veruleikin er at bæði Sjálvstýrisflokkurin og Fólkaflokkurin eru innarliga fegnir um, at teir nú fingu høvi til at leggja kósina um. At løgmaður turkar samráðingarslitið upp á danir er ein lættur máti at koma uttanum at tað í veruleikunum fer ein innanhýsis telving fram í samgonguni.

Men um sæð verður burtur frá partinum um samráðingarnar við danir, er Jóannes Eidesgaard væl nøgdur við løgmansrøðuna. Løgmaður vísir til náttúruna sum orsøk til at tað gongur væl búskaparliga, og leggur dent á at avbjóðingin í framtíðini verður at vísa skynsemi.

– Vit hava fyrr upplivað ein løgmann, sum gav sær sjálvum æruna av at fiskurin var komin aftur á grunnarnar, so í mun til tað, er sitandi løgmaður realistiskur, og tað dámar mær væl, sigur Jóannes Eidesgaard, formaður Javnaðarfloksins.

---

Formaður Sambandsfloksins um nýggjársrøðu løgmans:

# Langt frá orðum til gerð

**Formaður Sambandsfloksins, Edmund Joensen, dámar væl tað, sum løgmaður segði um búskaparligt skynsemi og sameinan av føroyingum. Men honum dámar lítið tað, sum landsstýrið veruliga ger á hesum økjum. – Niðurstøðan má vera, at tað er sera langt frá tí, sum landsstýrð sigur til tað, sum landsstýrið ger, heldur Edmund Joensen**

NÝGGJÁRSRØÐA
*Rúnar Reistrup*

Lyftini vóru vøkur og áheitanirnar vóru góðar í nýggjársrøðu løgmans, men tað broytir ikki uppá tað, sum í veruleikanum fer fram í landsstýrinum. Hetta var niðurstøðan hjá formanni Sambandsfloksins, Edmundi Joensen, eftir at hava hoyrt løgmann bera fram nýggjársrøðu sína.

– Orð um sameinan heldur enn spjaðing verða brúkt í leysum lofti í røðuni, men veruleikin er, at landsstýrið eftirhondini er blivið ekspertur í at gera tað beint øvugta. Sitandi samgonga hevur hesi seinastu árini verið íðin at býtt fólkið upp í betri og minni betri føroyingar. Føroyingar sum vilja taka ábyrgd og so hini. So orðini hjá løgmanni samsvara yvirhøvur ikki tað, sum í veruliekanum fer fram. Men tað er tað vanliga í slíkum nýggjársrøðum, sigur Edmund Joensen.

## Skelkaður av ákærunum

Annars bleiv formaður Sambandsfloksins ikki sørt skelkaður av teirri viðferð, sum danski forsætisráðharrin og danska stjórnin fingu í nýggjársrøðu løgmans.

– Løgmaður legði við stórum orðum donsku samráðingarnevndina undir ferð eftir ferð at hava brotið gjørdar avtalur. Sum tingmaður í andstøðu og limur í Uttanlandsnevnd Løgtingsins má eg siga, at eg kenni einki til at nakrar avtalur eru blivnar brotnar, sigur Edmund Joensen.

Tann partin av løgmannrøðuni, ið snýr seg um samráðingarnar, heldur formaður Sambandsfloksins sum heild vera tann mest ivasama, og hann heldur tað vera upp á sítt pláss at krevja eina nærri frágreiðing av løgmanni.

– Hvat eru hetta fyri brotnar avtalur, og hví er Uttanlandsnevndin ikki blivin kunnað um tær?, spyr formaður Sambandsfloksins og leggur afturat:

– Eg haldi at løgmaður skyldar bæði føroyingum og donsku stjórnini at greiða frá, hvat tað er hann meinar við, tí hetta eru grovar ákærur hann kemur við.

## Einki orð um fólkaatkvøðuna

Edmund Joensen heldur eisini, at løgmaður skyldar føroyingum eina frágreiðing um hvat tað er fyri ein fullveldisætlan, sum landsstýrið arbeiðir við í løtuni.

– Tað eru ikki meira enn tríggir mánaðir til føroyingar skulu til fólkaatkvøðu um fullveldisætlan landsstýrisins, men enn sita øll fullkomuliga óvitandi um hvat tað er, sum landsstýrið arbeiðir við. Landsstýrið skyldar enn føroyingum at siga frá, hvat hendir í løtuni, men sjálvt ikki í nýggjársrøðuni segði løgmaður nakað um hvat er í væntu til fólkaatkvøðuna.

Hetta tekur formaður Sambandsfloksins sum eitt tekin um at landsstýrið helst ikki sjálvt veit, hvat tað ger.

– Men løgmaður dugir væl at tosa rundan um tað, sum samgongan er ósamd um, og tí kemur hann als ikki inn uppá hvat landsstýrið ætlar í sambandi við fólkaatkvøðuna, sigur Edmund Joensen, formaður Sambandsfloksins, um nýggjársrøðu løgmans.

---

Formaður Miðfloksins um nýggjársrøðu løgmans:

# Eitt fitt røða

**Jenis av Rana, formaður Miðfloksins, heldur tað vera í fínasta lagi at løgmaður gav donsku stjórnini eina lítla fleingju í nýggjársrøðu síni, sum floksformaðurin kallar eina fitta og góða røðu.**

NÝGGJÁRSRØÐA
*Rúnar Reistrup*

– Eg var sjálvur við teimum niðri í Danmark undir samráðingunum, og eg eri líka keddur av handfaringini hjá stjórnini av fullveldismálinum, sum løgmaður tykist at vera í røðu síni, sigur Jenis av Rana í eini viðmerking til nýggjársrøðu løgmans.

Tí var tað hvørki óhóskandi ella ófólkaligt av løgmanni at finnast eitt sindur harðliga at teirri viðferð, sum føroyska landsstýrið fekk av donsku stjórnini undir fullveldissamráðingunum, heldur formaður Miðfloksins.

– Vit vera undirmettir av dønum. Teir vístu onga virðing fyri landsstýrinum, men hetta eru fólkavaldir menn, og teir má danska stjórnin virða.

## Kundi verið djúpri

Jenis av Rana dámdi væl røðuna hjá løgmanni og rósar honum fyri at tora at taka upp málið um skaðiligu árinini, ið standast kunnu av komandi oljuvinnuni.

– Hesi oljufólkini hava jú nøkur krøv – eisini til frítíðartilboð – sum løgmaður orðaði tað, og tí mugu vit vera til reiðar, tá oljufólkini byrja at streyma inn í landið. Tað var djarvt av løgmanni at taka hetta upp, haldi eg.

Tað einasta Jenis av Rana hevur at fílast á viðvíkjandi nýggjársrøðuni er, at hon ikki var serliga djúp.

– Eg kundi ynskt, at løgmaður fór eitt sindur djúpri og kanska kom inn upp á raðfestingar av teimum íløgum, sum vit kunnu tilláta okkum at gera komandi árini. Eftir mínum tykki er raðfesingin púra skeiv sum er, sigur Jenis av Rana, sum lýsir røðuna sum eina fitta og pena, men kanska nakað grunna, løgmansrøðu.



# Løgmaður ávarar ímóti spjaðing

**Anfinn Kallsberg minti í nýggjársrøðu síni á, at vit skulu øll vera í landinum, uttan mun til úrslitið av fólkaatkvøðuni í apríl. Í sama sambandi heitti hann á fólk um at vera saklig, siðillig og fólkalig í orðaskiftinum undan atkvøðuni**

NÝGGJÁRSRØÐAN
*John Johannessen*



*– Eru vit ein mentað tjóð, eigur tað at bera til at vera ósamd, uttan at tað elvir til persónligt agg, klandur og spjaðing, segði Anfinn Kallsberg, løgmaður, í nýggjársrøðu síni*

Tað var ein alfaðirligur peikifingur á lofti í nýggjársrøðuni hjá løgmanni hesaferð. Anfinn Kallsberg nýtti gamlaárskvøld høvi til at heita á føroyingar um at vera siðiligir í orðaskiftinum um føroyskt fullveldi.

– Tað er einki dulsmál, at ósemja er um hendan spurning millum føroyingar. Tað hevur tað altíð verið. Men eg vóni, at tað upp undir fólkaatkvøðuna fer at bera til at hava eitt sakligt orðaskifti um fyrimunir og vansar við hesi ætlan.

– Eg vóni, at allir føroyingar fara at kunna taka støðu til hetta álvarsmál á sakligum grundarlag. Og eg vóni, at tann politiski skilnaður, sum ein fólkaatkvøða altíð hevur við sær, ikki fer at hava við sær skilnað millum persónar. Eru vit ein mentað tjóð, eigur tað at bera til at vera ósamd, uttan at tað elvir til persónligt agg, klandur og spjaðing.

– Eg fari tí at nýta hetta høvi til longu nú at heita á øll tey, sum fara at taka lut í orðaskiftinum upp undir fólkaatkvøðuna, um at vera saklig, siðilig og fólkalig. Eg fari at heita á øll um at minnast til, at vit skulu vera her í landinum, eisini aftaná – uttan mun til, um úrslitið verður eitt ja ella eitt nei til ætlan landsstýrissins. Eydnast tað at forða fyri spjaðing og klandri, er nógv vunnið, segði løgmaður í nýggjársrøðu síni, sum hann helt í Tinganesi gamlaárskvøld.

## Hvassorðaður móti dønum

Løgmaður tók eisini aftur í gongdina í fullveldismálinum og samráðingarnar við donsku stjórnina. Her var løgmaður eitt sindur hvassorðaður. Hann staðfesti, at danska stjórnin noktaði at fylgja vanligum samráðingarreglum og ferð eftir ferð breyt tær avtalur, sum landsstýrið og danska stjórnin høvdu gjørt.

Hetta var nakað, sum gav afturljóð í donskum fjølmiðlum, sum hildu, at løgmaður hevði verið heldur ógvusligur í sínum útsagnum um samráðingarnar.

Anfinn Kallsberg vísti í røðu síni á, at landsstýrið royndi at halda fram við samráðingunum, hóast danska stjórnin ikki vildi samráðast um fíggjarliga partin og ferð eftir ferð breyt gjørdar avtalur.

– Men á fundinum við donsku stjórnina 26. oktober kundu vit staðfesta, at vit ikki fingu eina loysn, sum var nøktandi, og sum vit mettu kundi fáa undirtøku frá Føroya fólki. Á hesum fundi kom eisini til sjóndar grundleggjandi ósemja um, hvørji rættindi føroyingar eiga sum tjóð, staðfesti løgmaður í røðu síni.

Anfinn Kallsberg ásannar, at hetta var ein ógvuliga hugstoytt uppliving fyri hann sum løgmann, og hann vísti á, at neyðugt var at fara frá samráðingarborðinum, um landsstýrið ikki skuldi siga frá sær aldargomum rættindi hjá føroysku tjóðini.

Men løgmaður er kortini glaður um, at landsstýrið áhaldandi royndi at fáa nakað burturúr. Hann staðfestir, at hesar áhaldandi royndir hava givið føroyingum eina týðandi vitan, sum er, at danska stjórnin ógvuliga treyðugt vil lata frá sær yvirvaldsrættin yvir Føroyum.

– Tað merkir, at skulu vit vinna Føroyum tjóðarfrælsi, mugu vit gera tað sjálv. Og tað er júst tað, landsstýrið er farið í holt við, segði løgmaður í røðu síni gamlaárskvøld.

---

# Framgongdin setir stór krøv

**Løgmaður staðfesti í nýggjársrøðu síni, at stór framgongd er í føroyska samfelagnum. Men hann minti á, at framgongdin**

**setir krøv, og at stórar avbjóðingar standa fyri framman**

NÝGGJÁRSRØÐAN
*John Johannessen*

– Hóast tað er gott at vera føroyingur í dag, so merkir tað ikki, at tað er lætt.

Millum annað soleiðis segði løgmaður um búskaparligu framgongdina í røðu síni gamlaárskvøld.

Løgmaður vísti á, at ár 2000 hevur verið eitt gott ár hjá Føroyum, eins og 1999 eisini var tað. Hann staðfesti, at vit aftur í ár hava verið vælsignað við góðum fiskiskapi og góðum fiskaprísum, eins og alivinnan eisini hevur havt stóra framgongd.

– Hetta eiga vit at fegnast um og vera takksom fyri. Tað er mennandi, og tað er spennandi at vera partur av einum samfelag, sum hevur framgongd.

– Men tað setir eisini stór krøv. Tá ferðin er stór, er vandin fyri at fara av kós eisini stórur. Tað vita vit av beiskum royndum, segði Anfinn Kallsberg, løgmaður.

## Avbjóðani ár

Anfinn Kallsberg staðfesti, at sera stórar avbjóðingar standa fyri framman í árinum, sum vit júst eru stigin inn í. Og hetta eru avbjóðingar, sum koma at krevja nógv av okkum.

– Tær kunnu hava við sær stór framstig, um vit megna at taka við teimum og tora at loysa tær á ein skilagóðan hátt. Men talan er eisini um avbjóðingar, sum kunnu gerast ein stór hóttan, og kanska enntá taka skorðarnar undan okkara samfelag, sum vit kenna tað í dag, segði løgmaður og vísti á, at tað tí er umráðandi at vit við hegni loysa tær uppgávur, sum avbjóðingarnar hava við sær.

Stóru avbjóðingarnar, Anfinn Kallsberg røddi um, vóru serliga tríggjar; nevniliga oljuvinnan, stóra yvirskot landskassans og ríkisrættarliga framtíðarstøða Føroya.

## Oljan veldug avbjóðing

Í summar fara oljufeløg at bora eftir olju á føroyskum øki. Hetta heldur løgmaður vera eina velduga avbjóðing fyri ta politisku skipanina, umsitingina, vinnulívið og fyri alt Føroya fólk, tí tá skulu vit stýra størri kreftum og møguliga umsita størri virði, enn vit nakrantíð hava gjørt áður.

– Tað kann hugsast, at oljuvinnan fer at ávirka lønarlagið í landinum. Hetta kann gera, at aðrar vinnur – og serliga fiskivinnan – verða raktar, tí fólk heldur vilja arbeiða innan oljuvinnuna. Hesum mugu vit royna at fyribyrgja, tí vit vita, at oljuvinnan bert varir í nøkur ár. Skulu vit ikki standa á berum, tá hon endar, mugu vit syrgja fyri, at hon ikki køvir fiskivinnuna, men samvirkar við hana, segði løgmaður.

Men løgmaður væntar eisini, at oljuvinnan fer at hava við sær stórar mentanarligar avbjóðingar. Hann vísti í røðu síni á, at málið í oljuvinnuni er enskt, og tí verður uppgávan at varðveita og menna føroyska málið størri og torførari orsakað av oljuvinnuni.

Harafturat vísti løgmaður á, at tað eisini kann fara at ávirka mentanarlív okkara á annan hátt, um nógvir útlendingar koma til Føroya við øðrum siðum og øðrum krøvum til frítíðartilboð enn tað, vit eru von við í Føroyum.

– Alt hetta krevur av okkum, at vit gera okkum greitt, hvat tað eru fyri virði, vit ynskja at byggja okkara samfelag á. Og tað krevur av okkum, at vit gera karmar og seta krøv, sum gera, at okkara samfelag veruliga verður skipað eftir hesum virðum. Málið skal vera, at vit skulu stýra oljuvinnuni – hon skal ikki stýra okkum, segði løgmaður.